# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skeiv adressa Jóannes

»Taks hevur sum øll onnur rættin at royna eitt ivamál í rættinum. Føroya Rættur hevur gjørt úrskurð, og Taks hevur sjálvt myndugleikan at avgera, um málið skal skjótast inn fyri hægri rætt«

Orðini átti fíggjarmálaráðharrin, sum aðra staðni í blaðnum skjýtur við skørpum eftir journalisti og oddagrein hjá Sosialinum.

Fíggjarmálaráðharrin skrivar í viðmerkingini, at hansara eftirlitsskylda eisini snýr seg um at tryggja, at allar rættarreglur verða hildnar. Í so máta kann høvið eisini nýtast til at minna fíggjarmálaráðharran á, at rættarreglur ganga báðar vegir.

Er borgari fyri avgerð, sum hann metir vera órætta, er møguleiki at kæra. Í hesum máli til Skatta- og avgjaldskærunevndina. Men tá hevur Taks so sanniliga eisini skyldu at fylgja avgerðini hjá kærumyndugleikanum. Tað hevur Taks ongan tíð gjørt í málinum.

Tvørtur ímóti gjørdi Taks málið til eitt mál ímillum bilakeypara og –sølur. Væl vitandi um, at Taks hevði givið bilasølum boð um, at mvg av skrásetingargjaldi skuldi avroknast til Taks. Og hóast tað seinni er klokkuklárt staðfest, at lógarheimild ikki var fyri hesum, hevur Taks ongan tíð givið bilasølum boð ella vegleiðing um nakað annað.

Síðani málið av álvara tók seg upp, hevur Taks afturvíst hópatals krøv um endurgjald fyri mvg av skrásetingargjaldi. Rætturin hevur talað sítt týðiliga mál í hesum, og tað inniber millum annað, at afturvístu krøvini eru afturvíst á skeivum grundarlag. Júst sum kærunevndin kundi fortelja Taks á heysti 2006.

So talan er um skeiva adressu hjá fíggjarmálaráðharranum. Ein skeiv avgerð gerst ikki rættari, bert hon er endurtikin nóg ofta.

**Sosialurin**

## Óneyðugt at leggja mær orð í munnin



JÓANNES EIDESGAARD
landsstýrismaður

Tað er eingin loyna, at málið um Mvg av Skrásetingargjaldinum av bilum, keypt í tíðarskeiðnum frá 1999 til 2005, fyri allar partar er eitt sera óheppið mál. Tí eiga vit eisini av virðing fyri hvørjum øðrum at gera greitt, at talan als ikki hevur verið um, at TAKS hevur havt tað í kvittanini at snýta nakrar av landsins borgarum.

Tí hevur Leo Poulsen, blaðmaður á Sosialinum heldur onga grund til at leggja mær orð í munnin og geva mær meiningar, sum eg ongastaðni havi givið til kennar. Hann hevur skrivað stuttan greinastubba eftir prátið, eg hevði við Rás 2 í gjár um nevnda mál. Ikki tí, Leo Poulsen stendur ikki einsamallur í hesum máli, tí leiðarin í sama blaði tekur so dyggiliga undir við honum. Tí henda stutta rættleiðing:

Sum landsstýrismaður í fíggjarmálum havi eg eftirlitsmyndugleika við TAKS. Hetta eftirlit snýr seg millum annað eisini um, at allar rættarreglur verða hildnar.

Løgfrøðiligi ivaspurningurin um MVG av skrásetingargjaldi er í løtuni í rættarskipanini. TAKS hevur sum øll onnur rættin at royna eitt ivamál í rættinum. Føroya Rættur hevur gjørt úrskurð, og TAKS hevur sjálvt myndugleikan at avgera, um málið skal skjótast inn fyri hægri rætt.

Sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum havi eg fult álit á, at TAKS fylgir teimum avgerðum, sum rættarskipanin endaliga kemur til.

Góður siður er annars, at vit ikki leggja okkum ov nógv út í mál, sum enn eru í rættarskipanini. Og eitt mál er enn í rættarskipanini, so leingi báðir partar ikki hava staðfest, at málið er endaligt.

## Skiparin á slupp



KÁRI Á RÓGVI
løgtingsmaður
Sjálvstýrisfloksins

**Løgmaður avdúkaði á nýggjárinum, at hann í hugburði er frá eini farnari tíð. Hann gloymdi alla tænastuvinnu, almenna geiran, innlendska útbúgving og nýmenning.**

Á nýggjárinum hittust fólk sum vænt at skemta sær, men løgin var kenslan hjá handverkarum, pedagogum, frisørum, sjúkrafrøðingum, ráðgevum og sera mongum øðrum, at løgmaður fyrr um kvøldið hevði kunngjørt, at "vit útflyta so at siga alt, vit framleiða, og innflyta nærum alt, vit brúka."

Sambært hansara egnu hagstovu, framleiddu føroyingar fyri góðar 22 milliardir í 2007 – og útfluttu vørur framleiddar í Føroyum fyri knappar 4. "So at siga alt" er bara knappliga 2/11 rætt. Vit føroyingar framleiða so ómetaliga nógv annað enn útflutningsvørur. Tíbetur! Vit framleiða útbúgving, røkt, trygging, fígging, ráðgeving, umvæling, bygging, túsundtals ymsar tænastur og vørur til innlendis brúk. Útflutningsvinnan var prísgivin um ikki innlendis framleiðsla av rávøru, flutningi, tøkni og mongum øðrum var tøk sum fortreyt hennara. Ongin tímdi heldur at starvast í útflutningsvinnu í Føroyum, um ikki fólk og mentan vóru her at gera lívið vert at liva í hesum oyggjum.

Men løgmaður var verri enn. Útbúgving er fyri hann nakað, sum hendur fyri 'ung, leys fólk.' Tey skulu koma "heimaftur eftir lokna útbúgving," sigur løgmaður. Nú á døgum vilja tey mongu sleppa at seta saman útbúgvingar, taka part av teimum í Føroyum og síðani víðariútbúgva, endurútbúgva ella førleikamenna seg alt arbeiðslívið. "Lokin útbúgving" er fánandi hugtak.

At vit ikki hava fleiri útbúgvingartilboð her heima er størsta orsøkin til ta mest kritiskt manglandi rávøruna – menniskjansligt tilfeingi – í nýmenning og betran av verandi framleiðslu. Vit útflyta óneyðuga nógv ungfólk, sum verða óneyðuga leingi burtur og fáa óneyðuga lítið av útbúgving grundaða føroyskar fortreytir og føroyska gransking.

Løgmaður átti at tikið sær stundir at vitja okkara mongu innlendsku útbúgvingarstovnar. Tí hugsjónarliga er løgmaður tíverri afturi í farnari tíð, tá ið hann harmast um, at føroyingar 'hugdu við ivasemi at fyrstu sluppini.' Vandamálið er, at teir í dag – eisini á tingi – hyggja við ivasemi at gransking sum fyribrygdi. Vit gróðurseta tíverri ongar nýggjar vinnur við tí hugburði, at framleiðsla bert er vøruframleiðsla til útflutnings, at útbúgving bert er uttanlands og bert fyri grønan ungdóm.

**Veist tú, hvør hjálpti honum upp?**

Sjálvstýrisflokkurin leggur í valskrá síni dent á, at fáa ungdómin heim, at lesandi eru arbeiðsmegi og at útbúgving er vinna. Vit skriva: "Vit skulu skipa hægri útbúgving og gransking í Føroyum. Málið skal vera, at øll skulu kunna byrja og enda vanligar hægri útbúgvingar í Føroyum. Føroyskar útbúgvingar skulu vera so góðar, at útlendingar koma til Føroya at lesa.... Hægri útbúgving og gransking eru framtíðarvinna."

Løgmaður er ikki regentur í Føroyum, ikki 'Kong Kaj' ið sveimar omanfyri øllum og kann loyva sær at hugleiða um vøruútflutning í slupptíðini, meðan alt rapar rundan um hann. Hann er stjórnarleiðari, hevur ábyrgdina av fíggjarliga óskilinum, hevur staðfest allar tær lógir ið knappliga hava broytt skattligar og vinnuligar fortreytir hjá føroyingum, hevur staðfest fíggjarlógina, sum frá byrjan brýtur nýggju játtanarskipanina, og hevur rættarliga ábyrgd av landsstýrismonnum sínum, eisini fíggjarmálaráðharranum, sum ikki vil virða kærunevndir og sum brúkar drál og nøl ímóti óheimilað skattaðum borgarum.

Í barnarímuni 'Bukvald Græt' verður spurt: 'Veist tú, hvør hjálpti honum upp?' Spyrja vit, hvør fer at hjálpa føroyska búskapinum upp, er svarið neyvan: 'Skiparin á slupp!'

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.